VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

Móðir og barn í lívsvanda

Tað var sum við barnakonu. Níggju mánaðir skuldu ganga, frá tí at samfeløgini í restini av heiminum komu við sínum kreppupakkum, áðrenn politiska skipanin í Føroyum kom við sínum uppskoti um ein kreppupakka ella vakstrarpakka, sum hann eisini verður nevndur.

Og verkirnir eru ikki av enn. Hóast níggju mánaðir eru lidnir, ganga fimm mánaðir afturat, áðrenn barnið kemur til verðina. Tað er neyvan serliga heilsugott fyri barnið, og við heilsustøðuni hjá mammuni í mentu, er eisini hennara lív í vanda.

Uttan iva eru fleiri góðir lutir í vakstrar- ella kreppupakkanum. Men tað er serstakliga merkisvert, hvussu stórur partur av pakkanum verður býttur út til teirra, sum ikki hava ráð at taka ímóti honum.

Niðurlagin av rentustuðlinum, avtøka av mvg-stuðli til sethúsabygging, avtøku av rentustuðuli til sethúsauppsparing og hækkan av partafelagsskattinum til fíggjargeiran hava tað ti lfelags, at øll átøkini raka tey, sum skulu seta búgv ella sum fyri kortum hava sett búgv. Og mótrokningin, sum nú verður framd móti pensjonistum rakar eisini meint hjá teimum, sum ikki hava alt ov mikið av tøkum pengini. Altso er talan um teir báðar samfelagsbólkarnar, sum brúka lutfalsliga størsta partin av inntøkuni til nýtsluvørur. Og tí gerst negativa árinið av hesum lutfalsliga nógv størri, enn um siktið varð sett øðrvísi. Tá muna tey bæði prosentini, sum verða løgd oman á skattin av háinntøkum, rættiliga lítið. Talan er í fyrsta lagi um sama bólk, sum longu hevur fingið lyfti um avsláttur í ALS-gjaldinum, sum ikki verður so samhaldsfast longur.

At enda er eisini serstakliga merkisvert, hvussu rangvørur politikkurin hjá ABC hevur verið. Seinasta skeiðið, sum samgongan sat, varð gjarðað út flestar vegir, samstundis sum búskaparsveiggini vóru einvíst positiv – og har landið tí heldur skuldi fört ein tálmandi búskaparpolitikk.

Nú verða skattalættar, stuðulsskipanir og annað, sum økir um peningaumferðina í samfelagnum, avtikið í stórari andsøgn til tað, sum búskaparfrøðin hevur mælt til seinastu hálvtannað hundrað árini ella so.

Sosialurin

Lukkupakkin

So kom hann, lukkupakkin frá landsstýrinum. Og hann var, sum væntast kundi. Har nakað var at taka av, varð einki gjørt. Tey við tryggjaðum inntøkum fáa sítt, men tey, sum nýliga hava, ella í framtíðini ætla, at seta búgv, skulu gjalda gildið. Kanska er fólkatalið so høgt í Føroyum, at brúk er ikki fyri, at fleiri fólk seta búgv her. Og saktans fáa pensionistar eisini eina rokning, sum teir plaga

Nú hava tey sitið
og hálað og slitið
í heilakyknur so fáar
men smátt hevur gingið
og úrslitið fingið
bert ábøtur soltnar og smáar

hvat skulu vit halda
tí gildið alt gjalda
nú tey sum sær bústaðir byggja
tey av við nú mugu
mest allan sín stuðul
men onnur so fjálgt munnu liggja

tí meirvirðisgjaldið
í stuðli væl taldi
og rentustuðul var góður
men hetta vit taka
so heilt uttan nakað
sigur landsstýrismaður so fróður

jú so er við lógum
at inntøkum góðum
tey tora ei nakað at gera
men taka so støðu
ta gomlu søgu
tey veikastu byrðarnar bera

Edvard 24. juli 2009



Vit seta lýsingina upp fyri teg ókeypis.
Tel. 34 18 00
lysing@sosialurin.fo
Ring og fá ein prís!
Sosialurin

Innsent tilfar
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Marknaðarleiðari: Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Kykmyndir:
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

!!! Haldarar
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

Uppseting/prent:
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13^{30}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Mánadagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Týsdagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Mikudagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Hósdagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Frí. kl. 09	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.